Dómararnir:

# Torfør uppgáva

FIMLEIKUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



Dómararnir hava eina ógvuliga týðandi uppgávu í fimleikakappingum. Teir skulu fylgja væl við allatíðina, geva stig fyri tað, sum verður gjørt, og draga frá fyri tað, sum ikki verður gjørt.

Í Føroyum eru fáir dómarar, og umboð fyri fimleikasambandið siga tað vera sera torført at fáa dómarar til árligu stórkappingina.

Trupulleikin við, at landið er so lítið og øll kenna øll, tykist ganga aftur, og hann sæst eisini í fimleikinum.

Fimleikararnir byrja at venja í september mánaði, og nústani nú, í februar, sleppa tær at kappast. Og tað er ein kapping, sum avgerð alt. Liðini eru sera jøvn, og tað er tí eitt rættiliga torført arbeiði at døma liðini. Man veit hvussu hart tey hava arbeitt, og tey fáa bert henda eina møguleikan at vísa hvat tey duga. Tí er trýstið eins stórt á dómararnar, sum tað er á fimleikararnar. Fimleikararnir vita júst hvat teir vera trektir fyri, og hvat hini liðini verða trekt fyri. Tað er tí til tíðir eitt sera ótakknemmiligt arbeiði, og tað sást serliga aftur við, at so skjótt sum síðsta stigi er latið, sleppa dómararnir sær avstað.

Til kappingina um vikuskifti vóru seks dómarar, úr ymsu fimleikafeløgunum, men fimleikasambandið heldur, at tað hevði verið ynskiligt at havt 9 dómarar. Tað hevði givið latnu stigunum ein breiðari fót at standa á, og harvið tikið nakað av trýstið av einstøku dómarunum.

**Dómararnir eru býttir upp í tríggjar bólkar, sum skulu geva stig hvør sær**

**Tøkniligu dómararnir:** hyggja at torleikunum og uppstillingunum. Teir kanna, at torleika- og uppstillingarkrøvini verða lokin.

Teir hava 3,4 stig at geva av, og trekkja so frá, um okkurt manglar í seriuni.

Teir hava eisini 0,6 stig at leggja afturat, um serian inniheldur torleikar, ið eru torførari enn kravt er.

**Listarligu dómararnir:** hyggja at samanhanginum ímillum rørðslur og tónleik. Teir leggja eisini til merkis um rørðslurnar eru ymiskar, um tónleikurin skiftir tempo og um fimleikararnir virka sum ein heild. Teir ansa somuleiðis eftir, at allir fimleikarar útføra allar torleikarnar, og at fimleikurin endar, júst tá tónleikurin endar.

Listarligu dómararnir hava 6,0 stig frá byrjan av íðkanini, og trekkja so frá hesum karakteri.

**Framførðsludómararnir:** hyggja at, hvussu fimleikararnir bera seg, um teir strekkja hendur og føtur, um teir hyggja upp, gera í takt og útføra rørðslurnar sum tær skulu.

Hesir dómarar hava 10,0 at geva av, men trekt verður av, tá mistøk verða gjørd.

Eftir hvørja framførðslu geva dómarabólkarnir stig, og tey vera síðani løgd saman til endaliga úrslitið.

Ì alt eru 20 stig at vinna um øll framførðslan er fullkomin, og øll krøv eru møtt.

Hesi krøvini verða linkað, jú yngri íðkararnir eru. Tað vil siga, at genturnar hava nakað linari krøv, smágenturnar hava uppaftur linari krøv og pinkurnar hava fægst krøv at lúka.

## Krøvini til kvinnurnar í fríu íðkanini

**Tøknligu krøvini:** Torleikar, ið skulu nýtast í seriuni, verða býttir upp í fýra bólkar.í seruni skuli vera minst 12 torleikar

**- Javnvágir:** Á tá, á einum fóti ella sitandi. Minst einaferð skal javnvágin haldast í 2 sekund
**- Totalrørðslur:** Bylgjur og sving
**- Pivot:** Fimleikarin skal, á einum beini á tá, snara eina ferð runt um seg sjálvan.
**- Lop:** Lopið sjálvt og landingin skulu útførast væl.

**Harafturat skal:**
**Uppstillingin** broytast minst 10 ferðir,
**alt gólvið** nýtast.
**Tíðin** vera ímillum 2,30 og 3 minuttir,
**talið** av fimleikarum vera ímillum 6 og 10

## Krøvini til kvinnurnar í íðkanini við amboðum, í hesum førum hoppibandi

Tøkniligu krøvini: Íðkanin skal vísa ymiskar rytmiskar rørðslur, og minst 12 torleikar skulu takast við. Torleikarnir verða býttir upp í fýra bólkar.

**- Javnvágir:** Á tá, á einum fóti ella sitandi. Minst einaferð skal javnvágin haldast í 2 sekund
**- Totalrørðslur:** Bylgjur og sving
**- Pivot:** Fimleikarin skal, á einum beini á tá, snara eina ferð runt um seg sjálvan.
**– Lop:** Lopið sjálvt og landingin skulu útførast væl.

Harafturat skulu fimleikararnir:
**skifta um band** minst 4 ferðir, tvær ferðir við minst 4 metra fjarstøðu.
**Arbeiða við hoppibandinum**, t.d. hoppa, svinga og kasta
**Nýta báðar hendur** tá arbeitt verður við hoppibandinum
**Arbeiða við tveimum hoppibondum** í minst 16 taktir

Umframt hetta skal:
**uppstillingin** broytast minst 10 ferðir,
**alt gólvið** nýtast.
**Tíðin** liggja millum 2 og 2,3 minutt
**Talið** av fimleikarum liggja ímillum 6-8

# HF til Danmarkar

**Smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag vístu um vikuskiftið, at tær eru bestar í landinum. Umframt gullið, vunnu tær eisini luttøku í Danmarksmeistaraheitinum, sum verður 9. apríl**

FIMLEIKUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



Hildigunn Niclasen er, saman við Eyð Strøm, venjari hjá smágentunum hjá Havnar Fimleikafelag. Tær hava so mikið nógvar gentur, at tær hava tvey lið, nevnd a og b. Tað var a-liðið, har eldru genturnar eru, sum vann bæði fríu íðkanina og íðkanina við amboðum.

Spurd um hvat tað var, sum gjørdi, at júst hennara gentur vunnu kappingina í ár, svarar Hildigunn, at tær eru øgiliga góðar.

– Tað gekk væl, og eg haldi sjálv at serian var góð, og hóskaði væl til hesar genturnar. Sum venjari má man duga at raka støðið sum genturnar eru á. Um serian er ov torfør fyri tær, so telur tað niður. Er serian hinvegin ov løtt fyri genturnar, verður tað eisini trekt niður, og eg haldi, at vit raktu støðið hjá gentunum perfekt við hesi seriuni, greiðir Hildigunn frá.

Hon heldur at genturnar í Havnar Fimleikafelag eru sera javnt góðar, og megna væl at lúka øll krøvini sum skulu vera í eini seriu.

– Tær eru góðar, og útføra fimleikin væl. Eg haldi, at tað var tað, sum gjørdi at tær vunnu í dag, sigur Hildigunn, sum tó heldur at kappingin var sera jøvn.

– Tað verður verri og verri at vinna, tí kappingin verður javnari fyri hvørt ár sum fer, sigur Hildigunn.

Vinnarin av smágentukappingini fær í ár møguleikan at luttaka sum gestalið í DM, har sum genturnar og kvinnurnar higartil hava luttikið. Undanfarin ár hava føroysku liðini verið langt frammanfyri donsku liðini, so spennandi verður at síggja hvussu fer at gangast teimum í ár.

**Smágentur, Samanlagt**

| | | | |
|---|---|---|---|
| HFa | nr | 1 | 33,6 |
| Støkk | nr | 2 | 32,4 |
| Ljósið | nr | 3 | 32,25 |
| HFb | nr | 4 | 31.35 |
| Flog | nr | 5 | 27,9 |

Smágenturnar hjá HF a fara at luttaka í DM kappingini í Odense 9. Apríl

